Oyrarbakki, 16-05-2024

**Námsferð**

Góðu foreldur/avvarandi.

Seinastu árini hevur verið siðvenja, at 10. flokkur (eNám) ferð Námsferð.

Hetta verður broytt í skúlaárinum 2025/26.
Leiðslan og starvsfólk skúlans hava avgjørt, at núverandi 7. flokkur ferð túrin á heysti 2025 (við byrjan av 9. flokki).

Henda broyting verður gjørd, so allir næmingar sleppa á námsferð í skúlatíðini. Eisini hevur ein námsferð stóran týdning fyri sambandið næminganna millum. Vit meta, tað er stórt spell, at hetta liggur 2 vikur, áðrenn skúlatíðin á SVS er liðug.

Katrin og Rúni, flokslærarar í 8. flokki, eru sinnaði til at fara við núverandi 8. flokkunum á várið í 2025, tvs fyrst í mai, tá øll formell undirvísing er við at vera liðug.

Leiðslan vil ikki skera ígjøgnum á so stutt skotbrá, tí hetta merkir, at 3x flokkar á SVS fara av landinum í tíðarskeiðinum mai-sep '25. Tó vilja vit hervið lodda dýpi og lata tykkum koma til orðanna. Tað, sum talar fyri, er, at flokkar sjálvdan savna pening og skipa tiltøk fyrr enn seinastu mánaðirnar undan ferðini.

Vinaliga sendið ein mail til flokslæraran hjá tykkara barni við fylgjandi upplýsingum:

Navn á næmingi + JA

Navn á næmingi + NEI

Um tað er greiður meiriluti fyri námsferðini í mai 2025, verður farið undir at kanna, um vit hava møguleikan til tess í mun til tímajáttan, fráveru av starvsfólki o.ø. sum hevur avgerandi týdning.

Freist mikudagin 22/5.

Marjun I. Stauss, skúlastjóri

*G.G.*
*Verður farið komandi vár, kunnu tit hava hetta í huga í summar, tá fleiri teirra eru í arbeiði og kunnu savna pening til túrin.*